# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Herdis Katrin Debess** fer til gravar úr Sumbiar kirkju hósdagin klokkan 12.30. Tey, ið ynskja at minnast Herdis, kunnu lata Sumbiar kirkju eina gávu. Konto í Suðuroyar sparikassa.

**Jóhan Jensen, av Sandi**, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 90 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 14. Tey ið vilja minnast Jóhan, kunnu lata eina gávu til Leguhúsið í Nesvík. Konta í peningastovnunum.

Kistan við **Jóhonnu Hansen, Tvøroyri** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikukvøldið klokkan 19. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13 úr Tvøroyra kirkju.

**Jana Vinnersted**, fødd Ørvarodd, ættað av Sandi, búsitandi í Slagslunde, fer til gravar úr Ingholmskirke í Allerød fríggjadagin 22. august klokkan 14.

**Elsa Midjord av Økrum**, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 18. august, 81 ára gomul.

# Óli Jacobsen sekstifimm



Hósdagin 21. august fyllir Óli Jacobsen, høvundur og søguskrivari á Sosialinum, 65 ár.

Óli er kendur sum fakfelagsformaður, politikari og søguskrivari. Hann er ein sera vitandi, arbeiðssamur og eldhugaður maður. Hann er ein sonn drívmegi og er altíð opin fyri nýggjum hugskotum.

Síðan hann byrðaði á Sosialinum fyri góðum hálvum øðrum ári síðan, hevur hann skrivað umleið 140 síður við sínum føstu greinum: "Miðvikan", við søguligum tilfari, og "Hendur ið sleptu", ið er um fólk sum eru grivin í gamla kirkjugarði í Havn, umfarmt hópin av navnatilfari um fólk sum fylla runt og minningarorð.

Vit á blaðnum hava merkt, at stórur áhugi er fyri tilfarinum, sum Óli skrivar. Hann kennir nógv fólk og hevur eina stóra vitan um fólk í øllum landinum og eisini nógvum føroyingum sum búgva uttanlands.

Tað er ein fongur fyri okkum sum tjóð at hava slík fólk ímillum okkum sum við orðum og myndum kunnu siga okkum, hvussu fólk hava búleikast her á oyggjunum gjøgnum tíðirnar. Sosialurin hevur fingið eina heilt nýggja dimensión, síðan Óli bleiv knýttur at blaðnum.

Óli er giftur Kirstin, f. Nielsen, av Eiði. Tey eiga fýra børn: Linda, Kári, Óli Jákup, og Tróndur. Óli og Kirstin fylla sama dag, so vit ynskja teimum báðum hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, sum verður hildin saman við familjuni.

**Heilsan**
**Starvsfólkið á Sosialinum**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vil eg veita tykkum mongu, sum gjørdu mær 80 ára dagin ógloymandi. Tað var ómetaliga gleðiligt og stuttligt at hitta so nógvar vinir, kenningar og skyldfólk. Eg vil ikki nevna nøvn, tí tá kann onkur lættliga í gáloysni detta niður ímillum.
Tøkk til tykkum, ið matgjørdu, til tykkum, ið dekkaðu borð, til tykkum mongu, ið fluttu fram røður, fyri løg og framførslu av yrkingum, fyri hugnaligt undirhald undir borðhaldinum, fyri telefonsamrøður, blómur og fjarrit og tit, sum undirhildu við dansiløgum, sera hugnaligt, tað minti um góðar gamlar dagar, enn eina ferð - stóra tøkk øll somul.
Gud signi okkum øll.

**Vinarliga**
**Oluf Djurhuus**

# Kaj Klein farin um tey fimti árini

**Í gjár, 18. august, fór ein av kendu og markantu profilunum innan føroyskan tónleik, um tey 50 árini. Talan er um Kaj Klein úr Vestmanna**

MERKISDAGUR
*dagfinn@sosialurin.fo*



Kaj hevur altíð slóðað og borgað fyri tónleiki, ið er júst so, sum hann sjálvur vil hava hann. Og so kunnu onnur verða samd ella ósamd. Eitt tað fyrsta, ið hoyrdist til Kaj, var bandútgáva í áttatiárunum, har serliga rockútsetingin av lagnum Kall og Svein Ungi var serlig, og hevur slóðað fyri øðrum líknandi og væl-dámdum útsetingum av sama lag seinni.

Kaj, og bróðurin Karl Anton, sáli, høvdu eisini bólkin Plastnoist, ið var heilt serstakur og ikki líktist øðrum bólkum. Bólkurin gav nakrar útgávur út, og standa hesar enn sum varðar og minna á menn, ið gingu egnar leiðir.

Kaj Klein stóð eisini fyri upptøkuni av útgávuni hjá bólkinum Mold, sum kom fyri eini 10 - 15 árum síðani. Hesin bólkur var eisini serstakur, og hóskaði Kaj óivað væl sum ljóðblandari og maðurin við knøttarnar. Seinni tóku nakrir av manningini í Mold seg saman til bólkin 200, og tað sæst, at samspælið við Kaj var serligt og haldbært, tá Kaj spældi løg hjá Plastnoist saman við 200 til Planet Awards fyri eini tveimum árum síðani.

Fyri lítlum ári síðani kom útgávan, ið kallast Úr Maskinrúminum, har Kaj á sín serstaka hátt, og við djúpu røddini, tulkar føroyskar slagarar. Ein útgáva, ið hevur víst seg at vinna við tíðini.

Kaj hevur búð í Danmark í mong ár og ger tað enn. Kaj, og unnustan Elin, halda runda føðingardagin heima tann 23. august, og har verður tónleikur at hoyra, tí fleiri fara at spæla føðingardagin.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Dagurin**
**21. august. Sálomon**. Til minnis um hin vísa kongin Sálomon, sum sagt er frá í kapitlunum 1-11 í fyrru Kongabók í Gamla testamenti. Navnið merkir friður og vælferð.